


**Nr. 7** *29. mars 2026* **86. árg.**





# JESUS – KONGURIN

## Hetta er søgan um ein Kong

Vit skulu lesa úr Jóhannesar evangelium 18. kapittul, frá 33. versi: „Pilatus fór tá inn aftur í borgina, og hann kallaði Jesus til sín og segði við hann: „Ert tú **kongur jødanna**?“ Jesus svaraði: „Sigur tú hetta av tær sjálvum, ella hava aðrir sagt tær tað um meg?“ Pilatus svaraði: „Eri eg tá jødi? Fólk títt og høvuðsprestarnir hava fingið mær teg; hvat hevur tú gjørt?“

„Jesus svaraði: „**Ríkið mítt er ikki av hesum heimi**. Var ríki mítt av hesum heimi, tá høvdu sveinar mínir stríðst fyri mær, til tess at eg ikki varð givin upp til jødarnar. Men nú er ríki mítt ikki haðani.“ Pilatus segði tá við hann: „**Men so ert tú kongur kortini**?“ Jesus svaraði: „So er, sum tú sigur, **eg eri kongur**. Til tess eri eg føddur og til tess kom eg í heimin, at eg skal vitna um sannleikan; ein og hvør, sum er av sannleikanum, hoyrir rødd mína.“

## Kongurin í vakurleika sínum

Jesaja profetur sigur: „Kongin í fagurleika sínum skulu eygu míni skoða.“ Dávid sigur: „Mín sangur er um ein kong.“

Í 45 ár havi eg fylgt Jesusi, Konginum, út um heimin og sæð hann lagt uppí og farið til verka. Tá ið eg síggi hann frelsa, grøða og gera undur, tá verður hann vakur fyri hjarta mínum.

Men í seinna parti av prædiku míni, vil eg fegin luta við tær, tá ið Jesus er allarvakrast fyri hjarta mínum. Og tað er, tá ið eg síggi Kongin í líðing hansara, deyða og uppreisn, tí eg skilji, at hann gjørdi tað alt í kærleika fyri meg og fyri teg.

# Kongur verður handtikin

Jesus biður einsamallur í Getsemane. Gud hevur lagt allar heimsins syndir yvir á hann. Byrðan er so tung, at hann sveittar blóð. Men ein eingil úr himli kemur og styrkir hann. Lærusveinar hansara sova.

Tá brádliga verður urtagarðurin alljósur. Tað er skinið frá kyndlum, sum lýsa hann upp. Hermenn og leiðarar hjá jødafólkinum og tænarar sláa ring um Jesus. Hann stígur fram og sigur: „Hvørjum leita tit eftir?“

Teir svara: „Eftir Jesusi frá Nasaret!“ Jesus svaraði: „Tað eri eg!“ Tá gongur ein kraft út frá Jesusi, og teir verða allir slignir til jarðar. Bara Jesus stendur har – Kongurin.

Tú skilir, Jesus varð, tá ið samanum kemur, ikki handtikin. Hann læt teir handtaka seg. Hann kundi í somu løtu havt ákallað túsund einglar, lagt verðina í oyði og fríað seg sjálvan. Men villigur læt hann seg handtaka, so hann fekk doyð á krossinum í títt og mítt stað.

Tí verður Jesus handtikin og førdur fram fyri hægsta ráðið, og høvuðspresturin dømir hann til deyða. Síðani førdu prestarnir hann tíðliga á morgni langafríggjadag til rómverska landshøvdingan, Pontius Pilatus, at fáa deyðadómin staðfestan.

# Kongurin verður krýndur

Jesus stendur framman fyri Pilatusi. Landshøvdingin skilir beinanvegin, at hesin maðurin er meir enn ein vanligur jødi. Ákæran, ið ljóðar ímóti honum, er henda: „Hann sigur um seg sjálvan, at hann er Messias, ein **kongur**.

Tá svarar Pilatus: „Ert tú kongur jødanna?“ Jesus svarar: „Ríki mítt er ikki av hesum heimi. Var ríki mítt av hesum heimi, tá høvdu sveinar mínir stríðst fyri mær, til tess at eg ikki varð givin upp til jødarnar. Men nú er ríki mítt ikki haðani.“ Tá sigur Pilatus, hann er bangin og forvitin samstundis: „Men so ert tú kongur kortini?“ Tá svarar Jesus: „So er, sum tú sigur, eg eri **kongur**.“

Kongurin bleiv vrakaður. Teir føra hann inn í vaktarrúmið at krýna hann. Frá hesi løtu mást tú bara hugsa tær, at hetta varð gjørt fyri tína skyld. Hann má jú hava eina krúnu. Hvør kann vera kongur uttan krúnu? Teir finna langar, sýlspíssar tornar. Teir flætta eina krúnu til hansara, og so seta teir hana

á høvur hansara og trýsta hana niður, so hon fer inn ímóti heilanum frá øllum síðum.

Hetta hevði gjørt onnur fólk næstan ør; men hann stendur har sum ein kongur. Hann sigur einki. Hann má hava ein kongligan kappa. Teir geva honum ein, ein blóðreyðan kappa – merki um skomm, blóðreyður av skomm. So løgdu teir kappan uttan um hann, á ein rygg, sum beint frammanundan er vorðin meiðslaður, so hann er sum pløgdar foyrur, og kjøttrevsur hanga niður eftir ryggi hansara. Hann er Kongurin – tín Kongur.

Kongur má eisini hava ein kongsstav, og teir taka ein sevlegg og seta í høgru hond hansara. So stendur hann har við tornakrúnuni, við tí blóðreyða kappanum, og blóðið rennur niður eftir frá høvdinum og rygginum, og hárið hongur niður og klínir seg fast at andlitinum.

Hermenninir inni í vaktarborgini taka sevleggin og sláa hann í høvdið. Tornakrúnan trýstist enn djypri inn í høvdið, og so falla teir honum til kníggja og spýta upp í andlitið á honum, og teir siga við hann: „Heilur og sælur, kongur jødanna!“

Síðani taka teir hann og føra hann út á svalan, har Pilatus stendur, út móti tí stóra garðinum, har mannamúgvan er komin saman. Tá ið hann kemur út, fjala fólk andlit sítt fyri honum. Mong vita ikki rættiliga, hvat ið býr undir og veruliga hendir.

Í landi okkara Noregi, á frælsisdegnum 17. mai, stendur kongur okkara Haraldur á svalanum, og børn og vaksin í túsundatali ganga skrúðgongu fram við kongsborgini og rópa fagnaðarróp upp móti kongi og heiðra hann, og hann veittrar aftur. Mannamúgvan rópar ovurfegin: „Gud vælsigni kongin. Kongur leingi livi!“

Sí, kongur tín. Hygg upp á Jesus. Har kemur hann út og ber tornakrúnuna, skarlakskappan og kongsstavin, og so skal hann fáa heiðurin. Pilatus sigur: „Sí, her er maðurin!“ So koma fagnaðarrópini: „Krossfest hann, krossfest hann! Burtur við honum, gev okkum Barabas leysan.“ Tú og eg, vit vóru Barabas. Kongurin doyði í okkara stað.

## Kongsvegurin

Nú skal Kongur ganga kongsvegin. Allir heimsins høvuðsstaðir hava ein viðgitnan veg, sum er uppkallaður eftir einum navn-

framum kongi. Ein slík gøta er eisini í Jerusalem. Men henda gøtan kallast enn dagin í dag Via Dolorosa, pínu og líðingar vegurin. Skríggj, eiðir og illbønir, hatur og harðskapur liggja í luftini. Dust, skittur, trampandi hermenn, stivlar, sum sláa ímóti brúgvarsteinunum, skríggj frá mannamúgvuni, og mitt í øllum hesum, ein maður, sum dragsar ein stóran kross, sum skavar niður í brúgvarsteinarnar eftir honum.

Tað er Kongurin, og hann ger tað alt fyri teg og meg. Lítla løtu seinni smella hamarsløgini á Golgataheygnum, so verður krossurin reistur, og har hongur hann. Á krossinum hongur eitt uppslag við hebraiskari, latínskari og grikskari tekst. Pontius Pilatus hevur skrivað hana: „Kongur jødanna." (Mark. 15,26).

Flest øll munnu kenna hesa innskriftina á latíni: INRI, sum stóð fyri Iesus Nazaremus Rex Iudaeorum. Á hebraiskum stóð JHVH; – Guds egna navn, sum stóð fyri:Jeshua Ha-natzri Vemelek Ha-yehudim.

Um Pilatus ongantíð hevði sagt eitt satt orð fyrr, so segði hann tað tá. Men høvuðsprestarnir koma til Pilatusar og siga: „Tak hatta skeltið niður. Broyt tað. Skriva ikki, at hann er kongur jødanna, men at hann segði: „Eg eri kongur jødanna!"" Tá vendir Pilatus sær á og sigur: „Tað, sum eg havi skrivað, havi eg skrivað!"

*Aril Edvardsen. – Effie Campbell* umsetti.



**SUNNUDAGSBLAÐIÐ**
***ynskir øllum einar gleðiligar páskir í Jesu navni!***



**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 29. mars | **Tekstur:** | Luk. 19,28–40 og Mark. 15,16–37 | **Bíbliuorð:** | Matt. 21,5 og Jóh. 3,16 |
| 5. apríl | **Tekstur:** | Mark. 16, 1–15 | **Bíbliuorð:** | Mark. 16,15 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74




**Nr. 8** *12. apríl 2026* **86. árg.**

# JESUS – KONGURIN

## Kongurin doyr

Tað er altíð sorg, tá ið kongar doyggja. Vit høvdu ein kong eftir kríggið, sum vit vóru serliga góð við. Tað var Ólavur kongur. Stór sorg var í landinum, tá ið hann doyði. Alt hovið klæddi seg í svart. Gøturnar í Oslo vóru fyltar við svørtum vimplum og svørtum hermerkjum, sum hingu út úr handlum og húsum fram við gøturnar. Har var sorg. Fólk gingu við svørtum bandi uppi á sær – kongurin var deyður.

Tá ið Jesus – kongur okkara doyði, var eingin har, sum klæddi høvuðsstaðin í svart. Eingir svartir vimplar vóru í Jerusalem, tað var eingin, sum hevði hugsað um henda kongin, sum doyði. Men himmalsins Gud klæddi alla rúmdina í svart og í sorgarbúna, tí tað var Kongurin, sum doyði. Bíblian sigur: „Men frá sætta tíma kom myrkur um alt landið líka til níggjunda tíma, við tað at sólin myrknaði."

Tá ið Ólavur kongur var deyður, skutu kanónirnar á skansanum Akershus 21 skot – eina skotkvøðu til æru fyri okkara kæra, farna kong. Soleiðis gera tey altíð, tá ið ríkisovastar doyggja. Eingin gjørdi hetta í Jerusalem, men Gud í himlinum tók sær sjálvur av skotkvøðuni.

Har kom „ein harður landskjálvti, jørðin skalv, klettarnir rivnaðu, deyð risu upp, og teir, ið hildu vakt, fullu niður á andlit síni og søgdu: „Sanniliga var hesin maður sonur Guds." Og tey, sum stóðu burtur frá, slógu seg fyri bringuna og vendu inn aftur í býin."

Tá ið kongurin doyði, var tað við einum kongligum rópi; sigursgleði. Tað var ikki eitt róp um ósigur, tað var ikki eitt

vónloysis suff; men tað var eitt róp í sigursgleði, sum trongdi seg inn í himmalsins salir, sum trongdi seg niður í helvitis myrkur, og sum trongdi seg inn í verðina og inn í tíðina, og tað gongur gjøgnum tíðina tann dag í dag. Tað ljóðar um allan heimin.

Tað var eitt kongligt róp. Hann hevði sigrað. Hann hevði megnað tað, hann hevði borið syndir okkara, hann hevði verið førur fyri tí. Hann var um at doyggja í Getsemane. Hann var um at doyggja, tá ið hann gekk á Via Dolorosa, hann var um at doyggja, tá ið teir húðflongdu hann, hann var um at síga niður og doyggja, áðrenn teir fingu hann upp á krossin; men nú hevði hann megnað tað – hann náddi krossin.

„Hann bar syndir og sjúkur okkara upp á krossin," sigur Skriftin. So andaðist hann við einum sigursrópi: „Tað er fullgjørt!" og so hoknaði hann og var deyður. Men var hann veruliga deyður?

Nei, halleluja, hann var ikki deyður. „Hann leið deyðan í likaminum, men hann varð livandi gjørdur í andanum," sigur Bíblian, „og so fór hann niður í deyðaríki, helheim."

## Hann fór niður til heljar

Sært tú aðru trúargrein? „Eg trúgvi á Jesus Krist, krossfestur, deyður og jarðaður. Niðurfarin til heljar..." Á, halleluja! Eg síggi helvitis herar halda veitslu, tí nú halda teir, at Kongurin er deyður. Tað var vorðið so myrkt teir seinastu tímarnar. Djevlarnir elska myrkrið.

Men meðan teir frøast har niðri, í trónrúminum í hel, í deyðaríkinum, skyggir ein ljósglæma, sum slær niður í tað eina hornið í sali deyðaríkisins, og djevlarnir fara aftur eftir hæli, tí teir óttast ljósið. Gjøgnum ljósið kemur ein gangandi. Hann kemur gangandi gjøgnum salir deyðaríkisins sum ein kongur.

Tað er Jesus – Kongur okkara. Djevlarnir falla niður og tilbiðja hann, óndskaparins andaherar falla niður fyri honum. Skelvandi rættir djevulin lyklatyssið fram. Tá sigur Jesus við hann: „Eg havi sigrað, gev mær lyklar deyðans og heljar!" (Opb. 1,18).

So vendir hann sær á og fer yvir til tað rúmið í hel, sum kallast „fang Ábrahams", har øll tey heilagu vóru, har Ábraham, Ísakur, Jákup og Dávid vóru. Tí eingin slapp inn í Páradísið,

fyrr enn Kongurin var komin. Øll vóru farin til deyðsríkið, hel, har tey vóru í varðveitslu og bíðaðu eftir honum, sum tey høvdu trúð á.

Hann, sum var Ábels offur, hann, sum var Nóa ørk, hann, sum var blóðið á durastólpunum, hann, sum var páskalambsins offur. Hann læsir upp. Mær tykir, at eg síggi Ábraham. Hann skumpar undir Dávid: „Hygg, nú fara dyrnar upp. Nú kemur hann – kongur okkara!“ Halleluja!

So fara dyrnar upp, og **har stendur hann**. Tey hoyra rødd hansara: „Eg havi sigrað. Í dag skulu tit vera við mær í Páradísi!“ Skriftin sigur um hetta: „Hann fór niður til hinar lægru partarnar á jørðini og førdi burtur fangar.“ (Ef. 4,8–9). Summir teirra fóru enntá inn í heilaga staðin eftir uppreisnina og vístu seg fyri mongum, og so gingu teir víðari.

Teir máttu gera eina stutta vitjan, áðrenn teir fóru víðari upp í Páradísið. Jesus fór niður í hel og fríaði øll tey heilagu í Gamla Testamenti.

## Kongurin gjørdi sátt

Jesus fór eisini inn í himmalin sum Kongurin, sum bar fram sítt egna konglig blóð. Persónliga trúgvi eg, at hann gjørdi tað, meðan likam hansara lá í grøvini, tí í ævinleikanum eru ikki sekundir og minuttir.

Tá bar hann blóðið fram fyri andlit Faðirsins sum stóri høvuðspresturin, og „vann æviga loysn“ soleiðis, at allir syndarar kunnu fáa fyrigeving, og øll menniskju kunnu blíva frelst, um tey venda um.

Triðja dagin fór hann aftur til likam sítt og reis upp sum ein kongur.

## Kongligu boðini

So stendur hann á Oljufjallinum og rættir hendur sínar út og vælsignar lærusveinar sínar. Har gevur hann øllum lærusveinum sínum tey kongligu boðini: „Farið út um allan heimin! Kongur býður, kunngerð gleðiboðskapin fyri øllum skapninginum! Tann, ið trýr og verður doyptur, skal verða frelstur; men tann, ið ikki trýr, skal verða dømdur, og hesi tekin skulu fylgja teimum, sum trúgva (á Kongin):

Í navni mínum (í Kongsins navni) skulu tit reka út illar andar; (í Kongsins navni) skulu tit tala við nýggjum tungum;

(í Kongsins navni) skulu tit taka um ormar; (í Kongsins navni) skal tað ikki saka tykkum, um tit drekka okkurt eiturbland; (í Kongsins navni) skulu tit leggja hendurnar á sjúk, og tey skulu verða frísk.“

Hetta kann henda fyri teg í dag. Tí Kongsins megi er her, og einki kann sammetast við megi hansara. Trúgv á Kongin Jesus. Tak ímóti honum sum tínum Frelsara og Messias.

## Kongurin sum kemur

Men Kongurin kemur skjótt aftur. Øll tekin, bæði moralsk, vísindalig, landafrøðilig og politisk tekin siga okkum tað. Hann fer skjótt at koma aftur og døma livandi og deyð og ráða úr Jerusalem.

Tað er Kongurin, sum kemur. Men tá kemur hann ikki longur við náði og miskunnsemi til syndarar, men sum Dómari. Hann kemur eftir øllum sínum ríkisborgarum, teimum, sum hava trúð á hann og fylgt honum gjøgnum eina ónda og vantrúgvandi verð, sum hevur møtt honum við vanvirðing.

Hann kemur fyri at rudda burtur úr ríki sínum øll ógudilig og øll, sum sýttu fyri at viðurkenna hann sum kong í lívi sínum. Hann kemur sum tann kongurin, ið er farin av landinum og kemur aftur at halda roknskap við sínar borgarar.

Er Kristus vorðin Kongur í tínum hjarta? Hevur tú tikið ímóti honum sum tínum Frelsara og kongi? Hann er einasta bjarging tín. Hann er einasta vón tín fyri ævinleikan. Tú noyðist at taka ímóti honum her í tíðini, og hann fer at taka ímóti tær í himli, í ævinleikanum. Kongurin segði: „Hvør tann, ið tí vil kennast við meg fyri monnum, hann vil eisini eg kennast við fyri faðir mínum, sum er í himlunum. Men hvør tann, ið avnoktar meg fyri monnum, hann vil eisini eg avnokta fyri faðir mínum, sum er í himlunum.“ (Matt. 10,32–33).

Hann er undir liðini á tær sum tín Frelsari. Lat hann blíva **Kong tín í dag**. Amen!

*Aril Edvardsen* umsetti.

### SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 12. apríl | **Tekstur:** | Matt. 18,21–35 | **Bíbliuorð:** | Matt. 6,12 |
| 19. apríl | **Tekstur:** | Jónas 1–4 | **Bíbliuorð:** | Jón. 2,10b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74